Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Nú nærkast avgerandi løtan

Hondbóltur: Fimm hondbóltsdystir eru á skránni hetta vikuskiftið, og meðan onkur av hesum tykist avgerandi fyri, hvussu endaliga støðan verður í niðara endanum, hava aðrir avgerandi týdning fyri, hvønn veg FM heitið skal fara.

Jákup Mørk

Bert tvær vikur eru eftir, áðrenn heiðursmerkini fyri avrikini í hondbóltskappingini skulu handast, og meðan FM longu er avgreitt á kvinnusíðuni, eru framvegis trý lið eftir í gullstríðnum hjá monnunum. Spurningurin er so, um tað bert verða tvey eftir vikuskiftið, ella um trýtrins rakettin hjá strandingum enn einaferð fer upp móti stjørnunum.

Ein dystur í silvurstríðnum

Hjá kvinnunum eru tveir dystir hetta vikuskiftið, og í hvussu so er í øðrum teirra kann væntast, at áskoðararnir hava ein spennandi dyst í væntu.

Hetta verður tó neyvan í Runavík, har Kyndil uttan iva er stórfavorittur at vinna á Tjaldrinum, sum enn ikki hevur vunnið sær stig hetta kappingarið. Tað man tó vera so sum so við hugburðinum hjá kyndilsleikarunum, tí eftir at tær bert hava fingið eitt stig í seinastu trimum dystunum, eru vónirnar fyri heiðursmerkjum fjarðaðar munandi..

Suðuri í Vági skal VÍF, sum enn hevur møguleika fyri silvurmerkjunum, royna seg. Skal VÍF vinna sær silvurmerkini, er neyðugt at fáa í minsta lagi eitt stig burtur úr dystinum um vikuskiftið. Verður úrslitið eitt tap, kunnu Neistakvinnurnar sjálvar avgreiða silvurspurningin, tá tær komandi vikuskiftið taka móti Tjaldur.

Tá VÍF í grundspælinum vitaði í Vági, býttu liðini stigini millum sín, meðan vestmannagenturnar hava fingið fulla úrtøkuk úr heimadystunum móti VB. Nógv er tó hesuferð, sum bendir á, at talan verður um ein sera torføran dyst. Málverjin, Marjun Poulsen, er helst ikki tøk til dystin, og harumframt hevur Ioana Rápa eisini skaða at dragast við. Hon verður tó helst at síggja á vøllinum, men fyrr í vikuni var týðuligt, at hon ikki fekk leikt eins væl, og hon vanliga ger.

Tríggir ólíkir dystir

Hjá monnunum verða tríggir dystir leiktir um vikuskiftið, ein botndystur, eitt oddabrak og ein dystur millum topp og botn.

Botndysturin verður í Høllini á Hálsi, har hoyvíkingar skulu royna at vinna seg fram um kollfirðingar, sum í endaspælinum hava verið stinnasta liðið av teimum trimum niðastu.

Hoyvíkingar hava verið lítið sannførandi hetta kappingarárið, men kortini hava verið glottar í hóma í nøkrum av dystum teirra. Skulu teir basa KÍF, verður helst eisini neyðugt hjá teimum, at vísa seg frá síni bestu síðu, tí seinastu dystirnar hevur KÍF fleiri ferðir víst tenn móti oddaliðunum, og leygardagin var um reppið, at teir koppaðu Neistan.

Eddie Joensen hevur verið ein rættuligur styrkur fyri liðið, men hinvegin mugu teir vera Petur Martin Johansen fyri uttan. Hann fekk reytt kort seinasta vikuskifti.

Í Runavíkini skal Tjaldur royna at taka stig frá Kyndli, í einum dysti, har hvørki av liðunum hevur tað stóra at spæla fyri. Tjaldrið er í løtuni á aftasta plássi á stigatalvuni, men tá einki lið flytur niður úr fyrstu deild, kann tað gera teimum tað sama.

Kyndil kann heldur ikki røkka nøktum sum helst í ár. Teir hava vunnið steypakappingina, og tykjast eisini nøgdir við hetta. Lítið er tó at ivast í, at teir á útivølli móti Tjaldrinum eiga at roknast sum favorittar, og at teir eisini megna at liva upp til hetta heitið.

Stóri dysturin hetta vikuskiftið verður á Skála, har Føroyameistararnir taka í móti FM-biðlunum úr Neistanum.

Vit hava fyrr skrivað, at dystirnir, sum StÍF hevur eftir, eru álíkir eini steypakapping. Tapa teir ein dyst eru teir úti úr FM-stríðnum, so einfalt er tað. Hetta er kanska heldur ikki ringasta støðan at vera í, og flest minnast vit eisini, hvussu teir undanfarna ár sníktu sær framvið mótstøðuliðunum, soleiðis at teir á seinasta leikdegi vóru ovasta liðið. Hetta kann eisini gerast søgan í ár, men fyrsti partur av søguni skal so skrivast sunndagin.

At Neistin tó eisini ætlar sær at hava nakað at siga, er tó einki at ivast í. Gaman í eru teir einasta oddaliðið, sum kann loyva sær at tapa ein dyst, tað sum eftir er av kappingini, men hinvegin hava teir helst einki ímóti at halda fast um sigursrøðina, sum teir hava havt hetta árið. Higartil hava níggju dystir kasta átjan stig av sær, og megna teir framhaldandi at tvífalda úrtøkuna, er líkt til, at FM spurningurin verður eitt mál, sum Neistin og VÍF skulu avgreiða sínamillum.

Støðan undan vikuskiftinum

1. deild kvinnur

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 Stjørnan	9	8 - 0 - 1	545	426	119	25
2 Neistin	8	6 - 0 - 2	384	378	6	17
3 VÍF	8	4 - 1 - 3	441	410	31	16
4 Kyndil	8	3 - 1 - 4	419	380	39	14
5 VB	8	2 - 0 - 6	458	467	-9	8
6 Tjaldur	7	0 - 0 - 7	300	486	-186	0

1. deild menn

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	10	8 - 0 - 2	638	498	140	27
2 Neistin	9	9 - 0 - 0	621	520	101	27
3 StÍF	9	7 - 0 - 2	618	518	100	25
4 Kyndil	9	5 - 0 - 4	588	517	71	17
5 KÍF	10	3 - 0 - 7	492	629	-137	7
6 H71	10	1 - 0 - 9	512	633	-121	4
7 Tjaldur	9	0 - 0 - 9	504	658	-154	3

Herfølge móti Brøndby í morgin

Fótbóltur, Superliga: Sunnudagin skal oddaliðið, Herfølge, royna seg á heimavølli móti Brøndby, sm mong meta sum besta boð upp á ein komandi meistara

Jákup Mørk

Hóast byrjanin upp á seinnu hálvu í superliguni ikki var eins góð, og teir í Herfølge høvdu droymt um, so kundi tað verið verri.

Brøndby, sum av mongum serfrøðingum verða mettir sum favorittar til DM, taptu nevnliga eisini seinasta vikuskifti. Ístaðin er tað nú Lyngby, sum er á øðrum plássi, fimm stig aftan fyri Herfølge.

Júst Brøndby kemur á vitjan sunnudagin hjá Jákupi og teimum, og í hvussu so er fyri útiliðið má sigast, at hesin dysturin fer at hava avgerandi týdning fyri gullvónirnar hjá Bjerregaard og teimum.

Vinnur Herfølge, eru teir nevnliga níggju stig framan fyri Brøndby, og hóast tað tá eru 13 dystir eftir at leika, so kann tað gerast sera stræðið at vinna inn aftur.

Fyri Herfølge er dysturin sjálvandi eisini av sera týdningi. Ein sigur móti Brøndby vil sjálvandi styrkja um oddastøðuna, men harumframt man tað eisini vera av alstórum týdningi, at leikararnir merkja, at teir framhaldandi hava viðrák.

Lokaluppgerð

Todi Jónsson og liðfelagarnir úr FC Keypmannahavn, fáa hetta vikuskiftið vitjan av grannunum úr AB.

Bert tvey stig eru á muni millum hesi bæði liðini, sum bæði hava ætlanir um at standa seg í toppinum, hóast útlitini fyri hesum ikki eru so góð hetta kappingarárið.

Munurin á stigatalvuni er tó lítil, og ein sigur til annað liðið vil viðføra, at toppurin tódnar enn meira.

Botnuppgerð

AGF, sum er felagið har Óli Johannesen roynir at vinna sær pláss, datt undanfarna vikuskifti niður um niðurflytingarmarkið.

Sunnudagin fáa teir møguleika til at bøta um hetta, tá teir fara á vitjan hjá Esbjerg, sum hevur tvey stig fleiri enn AGF.

Hetta verður tó helst ein alt annað enn lættur dystur. Esbjerg hevur styrkt sær hópin í vetrarsteðginum, og vunnu á útivølli móti Brøndby fyri viku síðani.

Lítið er tó at ivast í, at AGF fer at leggja nógva orku í júst hendan dystin.

Í dystinum millum liðini bæði í Árhus, skoraði AGF sigursmálið á ein heldur merkisverdan hátt.

Esbjerg kærdi avgerðina hjá dómaranum hesum viðvíkjandi, og hava teir nú fingið viðhald í kæruni.

Stór diskussión er í Danmark, hvørt tað er rætt at broyta avgerðina hjá dómaranum, men í løtuni røkist fyri, at AGF og Esbjerg skulu leika dystin umaftur.

AGF hevur tó kært dómin, sum kann fáa avgerandi avleiðingar fyri framhaldandi lagnuna hjá teimum báðum liðunum í superliguni.

Aðrir dystir hetta vikuskiftið eru dystirnir, Lyngby-Vejle, OB-Viborg og Silkeborg-Aab.

Á Stórskýggja

Hjá føroyingum hevur tað ikki ligið so væl fyri at síggja donsku dystirnar í sjónvarpinum, eftir at TV3 keypti rættindini til at senda frá superliguni.

Ítróttarrásin hjá TV3, sum eitur 3+, sæst ikki serliga væl, men nú hevur Club 20 í Havn tikið stig til at broyta hetta.

Sostatt verður møguleiki at síggja Herfølge-Brøndby beinleiðis á stórskýggja sunnudagin kl. 16.00

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 Herfølge	19	11 - 4 - 4	32	24	8	37
2 Lyngby	19	10 - 2 - 7	31	27	4	32
3 Brøndby	19	9 - 4 - 6	33	22	11	31
4 Silkeb.	19	8 - 6 - 5	35	18	17	30
5 AaB	19	7 - 8 - 4	30	22	8	29
6 Viborg	19	8 - 5 - 6	26	26	0	29
7 AB	19	7 - 6 - 6	29	25	4	27
8 FCK	19	7 - 4 - 8	19	17	2	25
9 OB	19	4 - 8 - 7	16	25	-9	20
10 Esbjerg	18	5 - 2 - 11	20	35	-15	17
11 AGF	18	3 - 6 - 9	16	29	-13	15
12 Vejle	17	2 - 7 - 8	20	37	-17	13

Stóri steypadagur í flogbólti

Fyri fyrstu ferð í mong ár skulu steypafinalur aftur leikast í flogbólti. Finaludystirnir verða leiktir í Ítróttarhøllini á Hálsi, og verða tær eisini varpaðar beinleiðis út til sjónvarpshyggjarar kring landið. Frá heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum hava vit fingið upplýst leikarahópirnar hjá liðunum báðum

Nr.	Navn	Leikpláss	Hædd	Landsd.	Aldur
1	Gunnvá Fredriksen	Kantur	162	0	32
2	Helga Nordendal	Miðblokkur	180	20	24
3	Herborg á Mýruni	Hevari	175	0	20
4	Miriam Weihe	Kant/Diagonal	174	14	26
6	Elisabeth Rasmussen	Miðblokkur	168	3	36
8	Mai Prior	Kant/Diagonal	174	0	24
9	Gerda Nattestad	Kantur	169	7	20
10	Sólgerð Henriksen	Kant/Diagonal	176	0	18
11	Torgun Jónsdóttir	Hevari	164	0	30
12	Miriam Nattestad	Diagonal	171	0	24

Liðformaður: Helga Nordendal
Liðleiðarar: Suni Hansen/Miriam Weihe

Nr.	Navn	Leikpláss	Hædd	Landsd.	Aldur
1	Tove Riksfjord	Kantur	168	0	23
2	Margit Joensen	Kantur	163	25	26
4	Anna Jacobsen	Kantur/Hevari	169	0	23
5	Katrin Petersen	Hevari	160	0	17
6	Sonja Ravnsfjall	Miðblokkur	174	3	23
7	Tina Jacobsen	Miðblokkur	180	7	19
8	Marjun Kalsø	Hevari/Kantur	163	75	37
9	Berir Norðoy	Miðblokk/Kant	175	0	22
10	Elken Matras	Kantur	174	0	22
11	Elsa Olsen	Kantur	170	0	17

Venjari: Boro Ilic
Liðformaður: Marjun Kalsø

Nr.	Navn	Leikpláss	Hædd	Landsd.	Aldur
1	Heri Henriksen	Kant/Libero	170	0	23
2	Bogi H. Isaksen	Hevari/Kant	180	0	24
3	Arnfinnur Guðjónsson	Libero/Kant	175	0	20
4	Bárður Andreasen	Kantur	190	0	23
5	Jón Kári Frederiksen	Kantur	180	0	35
6	Hjalti Josephsen	Miðblokkur	192	0	21
7	Jóannes Poulsen	Miðbl./Kant	185	24	34
8	Borko Ilic	Kantur	192	18*	25
9	John Syderbø	Kant/Hevari	180	0	24
10	Trygvi H. Poulsen	Kant/Miðbl.	182	36	29

Venjari: Borko Ilic (*18 landsdystir fyri Bosnia)
Liðformaður: Trygvi Poulsen

Nr.	Navn	Leikpláss	Hædd	Landsd.	Aldur
2	Jákup William Sivertsen	Hevari	187	8	27
4	Pauli Hansen	Kantur	180	0	27
5	Andrias Hansen	Kantur	182	0	17
6	Johannes Ejdesgaard	Miðblokkur	188	49	36
7	Rasmus Madsen	Diagonal	195	0	30
8	Tummas Oli Mortensen	Hevari	172	30	38
9	Jan Hentze	Kantur	180	59	34
10	Steinar Eirikstoft	Miðblokkur	192	0	18
11	Klæmint Isaksen	Kantur	187	85	33
12	Pascu Romica	Miðblokkur	198	45*	32

Venjari: Pascu Romica (*45 landsdystir fyri Rumenia)
Liðformaður: Jan Hentze

Double kappingin liðug

Seinasta vikuskiftið varð seinasta umfar í Grand-Prix kappingini í tvímansleiki leikt í Havn. Samlaðu vinnararnir av Grand-Prix kappingini gjørdust hesir

Tvímansleikur, kvinnur:

Nr. 1 Ingun Hansen, Strálan, og Kristianna Thorkildshøj, HBF, 1975 stig
Nr. 2 Guri Poulsen og Elsa Thorkildshøj, báðar úr HBF 1915 stig
Nr. 3 Elin Jacobsen, HBF, og Borglis Fagradal, Strálan, 1815 stig

Blandaður tvímansleikur:

Nr. 1 Kristianna Thorkildshøj og Heðin Joensen, bæði úr HBF 1940 stig
Nr. 2 Elin Jacobsen og Erland Poulsen, bæði úr HBF, 1920 stig
Nr. 3 Guri Piulsen og Regin Hammer, bæði úr HBF, 1825 stig

Tvímansleikur, menn:

Nr. 1 Regin Hammer og Erland Poulsen, báðir úr HBF, 1945 stig
Nr. 2 Gunnar M. Gregoriussen og Heðin Joensen, báðir úr HBF, 1940 stig
Nr. 3 Bjartur Lamhauge og Aksel Poulsen, báðir úr HBF, 1245 stig

Blandaður tvímansleikur, Heðin Joensen og Kristianna Thorkildshøj

Tvímansleikur, kvinnur, Kristianna Thorkildshøj og Ingun Hansen

Tvímansleikur, menn, Erland Poulsen og Regin Hammer